# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Skattalættar til pensionistar og láglønt

Tað skal ikki nógv hugflog til at ásanna, at flestir føroyskir pensionistar eru vorðnir fíggjarliga illa fyri. Oljuprísirnir og matvøruprísirnir eru hækkaðir, og livikostnaðurin sum heild er vorðin nógv hægri enn fyri bert fáum árum síðani. Tað man standa flestøllum borgarum greitt, at fólkapensiónin hevur ikki fylgt prísunum seinastu árini. Føroyar eru vorðnar eftirbátur í norðurlenskum høpi, tá um pensiónir ræður. Í grannalondum okkara hava løntakarar tríggjar stabbar at standa á, tá ellisárini koma. Hesir eru ein fólkatrygging, ein pensiónstrygging í pensiónskassa so eitthvørt slag av arbeiðsmarknaðaeftirløn. Her hjá okkum er lítið og einki hent. Fólkapensiónin er vorðin eitt eiti, og Samhaldsfasti ger hvørki frá ella til, og tað gongur striltið við at fáa til vega munadyggar pensiónsskipanir gjøgnum fakfeløgini.

Tað er tí stórur tørvur á tiltøkum, sum kunnu lætta um dagligu útreiðslurnar hjá fólkapensionistum. Ein tann tyngsta byrðan er oljugjaldið, sum mong høvdu vónað fór at verða avtikið. Tað er ikki løgið, at pensionistar og onnur láglønt hildu seg hava orsøk til hesa vón, tí flokkar í valstríðnum lovaðu at avtaka ella at lækka hetta illa dámda avgjald. Men nú boðar fíggjarmálaráðharrin frá, at vit ikki skulu rokna við einum lægri oljugjaldi. Hetta er eitt vónbrot fyri mong. Vit hava áður mint á, at ætlanini við oljugjaldinum upprunaliga var at fáa til vega stovnsfæ í ein grunn, sum skuldi fíggja alternativar orkukeldur. Hetta varð av ongum, og oljugaldið gjørdist eitt av mongum avgjøldum, sum gera lívið súrt hjá láglønarbólkum og pensionistum.

Tað er hinvegin sera gott og í tøkum tíma at broyta býtið av skattabyrðunum, og tí munnu mong fegnast um fráboðan fíggjarmálaráðharrans um, at næsta ár verður lívið léttari hjá pensjónistum og lágløntum. Næsta ár skulu pensjónistar og tey lágløntu í Føroyum hava eina skattalætta, sum munar, sigur fíggjarmálaráðharrin. Hetta hevur samgongan avtalað, nú hon er farin undir arbeiða við fíggjarlógini 2009. Karsten Hansen sigur, at í sambandi við fíggjarlógina fyri næsta ár hevur nógv verið tosað um korini hjá pensjónistum og lágløntum, nú matur, olja og aðrar vørur og tænastur eru so nógv dýrkaðar. Tað er bæði gott og jaligt, at samgongupolitikkarar nú ásanna, at støðan hjá pensionistum og lágløntum nú er vorðin so ótolandi, at neyðugt er við politiskum tiltøkum. So langt so gott, og skamm fái hann, sum sigur samgonguna ringa fyri henda fráboðaða skattalætta, sum snýr seg um einar 140 milliónir. Tó skal viðmerkjast, at sjálv tøknin í hesum – hetta at leggja kringvarpsgjald og sjúkrakassagjøld inn í skattaskipanina er ikki heilt vandaleys. Eftir stendur nú at fáa til vega eina heilt nýggja pensiónskipan, nær hon kemur fyri dagin, man fáur vita.

**Sosialurin**

## Nær fáa vit ein hart tiltrongdan uttandurapall/speakers corner?

ELSEBETH GUNNLEYGSDÓTTUR HANSEN



Nú býurin bjóðar seg fram á ymsum økjum og nógvir útiaktivitetir eru, kunnu vit staðfesta, at vit her í Klaksvík so dyggiliga mangla ein fastan uttandura pall, har norðoyingar kunnu samlast til gaman og álvara.

Í Klaksvík hevur mentanin altíð havt eitt stórt pláss hjá fólkinum, og ofta samlast nógv fólk bæði til álvara og gaman til ymisk endamál og á ymsum støðum.

Eg haldi, at tíðin nú er komin, at Klaksvíkar Kommuna ger íløgur í ein uttandura pall í Klaksvík. Pallurin skal verða ein yvirdekkaður permanentur pallur, ið hevur hóskandi støðd og við øllum neyðugum hentleikum/tøkni, ið ein slíkur pallur hevur brúk fyri, soleiðis at øll kunnu gera brúk av honum og tøknin skal vera permanent. Pallurin kundi staðið á tí fría økinum norðanfyri/uppat skýlinum. Skýlið á Injector Arena gevur góða lívd fyri lágættini.

Klaksvíkar Kommuna eigur økið og er hetta eitt gott og rúmsátt øki.

Hettar kundi verið Torgið í Klaksvík, har eisini ein lýsingartalva kundi verið, har øll tiltøk yvirhøvur verða lýst. Á henda hátt verður fólkið kunnað, um hvat fyriferst í býnum. Eg ivist onga løtu í, at tað fer ikki at ganga long tíð, áðrenn hettar verður staðið, har fólkið fer at møtast bæði til álvara og gaman.

Um vit nú hugsa, at vit flyta fleiri av aktivitetinum, sum plaga at vera á Vágstúni, oman á fríøkið norðanfyri skýlið við Djúpumýru, hevur hettar onki inntriv í ferðsluna við sær.

Hetta hevði verið ein góður pallur hjá teim ungu á Dávavirkinum o. ø. at víst síni kynstur á og har kundu samkomurnar í býnum havt síni útimøtir og onnur mentannartiltøk so sum jólahald, torradagar o.l. kundu somuleiðis verið har.

Vónandi tekur Klaksvíkar Kommuna væl ímóti hesum.

## Fólkaflokkurin og samhaldsfasti

FRANK DAVIDSEN



Jú ein kann spyrja, hvat teir hava til felags, tí er tað nakað sum Fólkaflokkurin ikki hevur á stevnuskránni, so er tað samhaldsfesti.

Tí mundi tað falla mongum fyri bróstið, tá formaður Fólkaflokksins í hesum døgum tekur samhaldsfasta til sín, soleiðis at tað sær út sum um hann hevur verið heitur talsmaður, fyri samhaldsfasta tey undafarnu valskeiðini.

Í 1991, tá Javnaðarflokkurin legði fram uppskot um at gera samhaldsfasta til veruleika, var ætlanin at inngjaldið skuldi vera 2% frá hvørjum parti. Tíanverri so royndi Fólkaflokkurin allar snildir at sabotera kanska eitt tað mest geniala uppskot, ið nakrantíð er lagt fram á Føroya, eitt uppskot við ongari umsiting, eins og tað hevði eina sjálvregulerandi prísregulering.

Fólkaflokkurin fór so langt, at teir fyri yvirhøvur at samtykkja uppskotið kravdu, at navnið skuldi broytast, fyri at kamuflera at tað var eitt samhaldsfast uppskot, har tær breiðu herðanar skuldu bera sín stóra part til hesa genialu skipan.

Sjálvt um inngjaldið, vegna tvørrandi vilja frá Fólkaflokkinum, bert gjørdist 0,5 % so varð spírin lagdur til hesa skipan.

Men ta syndarligu lagnu tað fekk var, at eisini Sambandsflokkurin við Edmund Joensen á odda ynskti hetta uppskot "har sum pipari grør". Tí skuldu tað ganga heili 13 ár, áðrenn inngjaldið aftur varð hækkað, nemliga í

2004 upp í 3/4 %
2006 upp í 1 %
2007 upp í 1,5 %
2008 upp í 1,75 %

Tað vil siga, at øll gullárini, frá 1995 – 2004, tá Fólkaflokkurin sat við landsins leiðslu, fingu pensjonistar og samhaldsfasti ikki eina krónu í hækking.

Um vit ímynda okkum, at umsorganin hjá formanninum í Fólkaflokkinum hevði verið eins stór tey árini, høvdu pensjonistar í dag helst fingið einar 5-6.000 kr um mánaðin úr samhaldsfasta, ella kanska meira.

Ætlanin hjá okkum, sum tá løgdu lunnar undir samhaldsfasta, var at peningurin skuldi koma verandi ættarliði av pensjonistum tilgóðar, nakað sum Henrrik Old hevði frammi fleiri mánaðar fammanundan.

Tað kundi verið upp á sítt pláss, at trivnaðarnevndin bað fíggjarmálaráðharran gera eina útgreining, hvussu stór upphæddin í samhaldsfasta hevði verið í dag, um Fólkaflokkurin hevði hækkað inngjaldið til samhaldsfasta frá 1996 – 2000 samsvarandi tí hækking, ið gjørd er frá 2004 – 2008.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.